# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 14.11.2016 kl. 17.30

Á fundi: Trúgvi Gudmundarson
Rúni Thomsen
Magni Bertholdsen
Eyðfinn Debes
Martin í Nesi
Niels Olaf Eyvindsson (fyri Jóhan Eli Poulsen)

Ikki møtt: Niels J. Thomsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um stuðul til prenting av blaðnum ”Eftirskúlin nr. 11”.**
   Samtykt varð við fýra atkvøðum ímóti og tveimum fyri ikki at stuðla.

2. **Umsókn um stuðul við keyp av jólakalendarum frá Lions Club Suðuroy.**
   Ágóðin fer eins og undanfarin ár til vælgerandi endamál. Samtykt varð einmælt at stuðla við keyp av 160 jólakalendarum.

3. **Umsókn um stuðul fyri 2017 frá Hvalbiar sóknar bygda- og kolasavni.**
   Samtykt varð at svara, at kommunan er jalig í sambandi við játtan av stuðli, men ynskir at fáa fleiri upplýsingar, m.a. fíggjarætlan fyri 2017 og hvørjar ætlanirnar eru annars.

4. **Umsókn um stuðul frá Bóltfelagnum Royn.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 50.000,- fyri 2016/2017.

5. **Umsókn um stuðul til verkætlanarferð frá M5 á Vinnuháskúlanum.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 1.000,-.

6. **Umsókn um stuðul við keyp av jólakalendarum frá Barnabata / Í menniskjum góður tokki.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

7. **Umsókn um stuðul til keyp av felagshúsi frá Suð. Norð. Bjargingarfelag.**
   Samtykt varð einmælt at játta kr. 120.000,- íalt í ár og komandi trý árini.

**8. Umsókn um marknaumskipan av uttangarðsjørð matr. nr. 29c, Hvalba.**
Søkt verður um marknaumskipan av uttangarðsjørð, soleiðis at matr. nr. 29c letur uml. 2 gl. 14 sk. til matr. nr. 29e. Samtykt varð einmælt at viðmæla marknaumskipanini.

**9. Umsókn frá Hvalbiar skúla um keyp av brandskápi.**
Samtykt varð einmælt at keypa skáp frá Inventar Tænastuni á kr. 5.500,-.

**10. Skriv frá Hvalbiar skúla um játtan til svimjing og lektiuhjálp í 2017.**
Samtykt varð einmælt, at bæði svimjingin og lektiuhjálpin í Hvalbiar skúla halda fram komandi ár.

**11. Onnur viðgerð av fíggjarætlan fyri 2017.**
Samlaða fíggjarætlanin fyri 2017 er kr. 32.408.000. Útreiðslurnar til rakstur eru kr. 25.908.000, harav útreiðslur til eldrasamstarvið eru mettar til kr. 7.949.000. Inntøkurnar eru mettar til kr. 28.525.000, harav inntøkur í sambandi við eldrasamstarvið eru ásettar til kr. 7.200.000. Útreiðslurnar til løgur eru kr. 6.500.000, barnagarður kr. 4.000.000, vatnveiting kr. 2.000.000 og kloakkir kr. 500.000. Skattaprosentið verður framvegis 20% og barnafrádrátturin hækkar við kr. 500 til kr. 6.500 pr. barn. Fíggjarætlanin varð einmælt samtykt.

**12. Fyrsta viðgerð av eykajáttan fyri 2016.**
Umsóknin um eykajáttan kr. 1.445.000 varð gjøgnumgingin. Ongar viðmerkingar vóru til eykajáttanina.

**13. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**
Nevndirnar høvdu ongi mál.

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundur lokin kl. 19.00

| | | |
|---|---|---|
| Trúgvi Gudmundarson | Rúni Thomsen | Magni Bertholdsen |
| Eyðfinn Debes | Martin í Nesi | Niels Olaf Eyvindsson |